VIÐMERKINGAR

Verkfallið og ILA-sjúkan

**Føroya Arbeiðarafelag
Havnar Arbeiðskvinnufelag**
Tórshavn, 16.05.2001

Tað er ikki verkfallið, sum er orsøkin til ILA-sjúkuna

Fjólmiðlamir hava seinnu dagamar gjørt nógv burtur úr stjóvni hjá alibrúkinum á Funningsfiroi, har ILA-sjúkan hevur tikio seg upp.

Avísir personar, væl stuðlaðir av ávísum fjólmiðlum, tykjast at royna at skap øsing móti okkum falkfelógum, sum á fult lógligan hátt hava lyst verkfall mú sáttmálaloysi er.

Vit skulu minna á, at tað ikki er verkfall okkara, sum er orsøkin til ILA-sjúkuna, og at sjúkan varð staðfest langa tíð áðrenn verkfall okkara varð lyst.

Føroyar hava onganti hávt kapasitet at brenna smittuberandi deyðan laks

Tað er ein sannroynd, at deyði laksurin frá alibrúkinum á Oyndarfiroi í mánaðir hevur staðið m.a. á Leirvíkvegum, tí brennistøðvarnar ikki hava nógvleika fyri at brenna allan henda laks.

Tað er tí beinleiðis misvísandi og ein reingjan av veruleikanum, at almennir embætismenn nú í fjólmiðlunum vilja rógva upp undir, at tað er verkfall okkara, sum kann koma at føra við sær, at smittan verður spreidd til onnur alibrúk ella ennká smoltstøðvarnar.

Stríðsanerkanin, at smittuvandin helst ikki er stórvegis stóri í dag enn hann var áðrenn verkfall okkara varð lyst, og undir øllum umstøðum er tað sleivt at royna at leggja ábyrgdina á felag okkara, tí vit hava okkara fulla rætt at lysa verkfall, tá sáttmálin er farin úr gildi.

Politikarar okkara hava ábyrgdina av stríðinum

Sum vit hava skilt, so er tað einpartur av teimum treytum í avtaluni millum Føroyar og EU, at allur fiskur sum gerst sjúkur av smittuberandi sjúku skal brennast.

Landsstýrismenninir hava alla tíðina verið greiðir yvir, at vit í Føroyum als ikki hava tann kapasitet sum skal til fyri at brenna fiskin, um sjúka tók seg upp, men kortini skrivaðu teir undir avtalu við EU.

Politikarar okkara hava tí í veruleikanum bundið seg til at seta í verk tiltøk, sum teir fræmmanundan vistu at vit í Føroyum ikki vóru førir fyri at lúka, og tí eru tað politikarar okkara, sum hava ábyrgdina av stríðinum, sum nú er ikomin.

Grunnurin, sum skal stuðla alivinnuni í sambandi við sjúku er tómur

Sum kunnugt varð fyri nøkrum árum síðani settur á stovn grunnur, sum skuldi veita alarum endurgjald í sambandi við sjúku í alibrúkum teirra.

Vit hava frætt, at hesin grunnur er tómur, og at hvørki landsins myndileikar, Arbeiðsgevarafelagið ella alarnir sjálvir hava tikið stig til, at taka neyðugu stigini, soleiðis at grunnurin aftur kann koma at virka.

Falkfelógini ella vanligi lóntakarin hava tí onga ábyrgd av, at alibrúk sum ikki verða av sjúkum ikki fáa endurgjald fyri figgjarliga tap teirra.

Hvat ger Føroya Arbeiðsgevarafelag?

Vit skilja ikki rættuliga hví eingin spyr nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag hví teir einki gera við stríðsuna hjá alarunum, sum eru limir í felag teirra.

Tað er Arbeiðsgevarafelagið, sum skal taka sær av áhugamálunum hjá limum sínum, men hóast hetta so hevur leiðsluni í Arbeiðsgevarafelagnum lagt upp til verkfall, sum teir vistu fór at raka teirra egnu limir sera meint.

Fyri nevndina á Arbeiðsgevarafelagnum hevur tað helst stóri tvíhugi, at avtala eina ráðagerð við onnur falkfelóg móti felógum okkara, enn at hugsa um hvat tænir limum teirra best.

Kann tað veruliga vera nøkur oyru meina um tíðan, ein viðbót eyka ella ein sámuligur lónarbati eftir starvsaldri, sum hevur fingið Føroya Arbeiðsgevarafelag at slept limum sínum upp á fjall? Neyvan, men heldur er tað ein roynd at spæla við mørkunum ella fyri at tekðjast ðorum falkfelags-leiðarum, sum arbeiðsgevararnir hava gjørt ráðagerð við mótvegis felógum okkara, sum er orsøkin til, at nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur skúgva til viks alt at lit til limir sínar, fyri at forða felógum okkara í at fáa í lag nýggjan sáttmála.

Vit fara tí undir ongum umstøðum at átaka okkum ábyrgdina av teimum avleiðingum, sum ráðagerðin hjá nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag, fer at hava fyri teirra egnu limir.

Karl Johansen avdúkar sína ráðagerð móti fakfeløgunum

**Føroya Arbeiðarafelag
Havnar Arbeiðskvinnufelag**
Tórshavn, 16.05.2001

Vit hava í kvøld hoyrt, at Karl Johansen við Útvarp Føroya hevur sagt, at um Føroya Arbeiðsgevarafelag góðtekur at gera sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, sum gevur hesum felógum stóri lónarhækking enn Havnar Arbeiðsmannafelag, so er álit hansara á arbeiðsgevarannar fólkið.

Hesi úttalisli avdúka tað sum onnur falkfelsfólk í Føroyum leingi hava havt illgruna um, nevnliga at Karl Johansen als ikki hugsar um føroysku arbeiðarafjóldina.

Tað er ilt hjá falfelagsfólki, sum hevur bert tað minsta fakliga medvit, at ímynda sær, at falkfelagsformaður skal tora at ásanna, at hann hevur gjørt avtalu við, ella hevur sett sum treyt yvirfyri Arbeiðsgevarafelagnum, at limir í ðorum fallkfelógum ikki skulu hava nakran lónarvíkstur ella bert hava ein evarska lítlan lónarvíkstur, sum Karl vil sleppa at áseta.

Hvat sigur nevndin í Havnar Arbeiðsmannafelag? Vit kenna øll fleini av hesum nevndarlimum, sum bera orð fyri at hava falkfelagsmedvit og skilja tvíhugin av ikki at loypa onnur falkfelóg í ryggin, so vit hava ilt við at trúgva, at hesir nevndarlimir taka undir við orðunum hjá formanni teirra, men gamalt er at siga, at tann sum tigur hann samtykkir.

Vit trúgva heldur ikki, at vanligi limurin í Havnar Arbeiðsmannafelag hevur tað áskoðan, at tað er uppgávan hjá formanni teirra, at gera avtalur við arbeiðsgevarar um, at onnur falkfelóg ikki skulu hava meira enn ein evarska lítlan lónarvíkstur.

Grundin til hesa ráðagerð er møguliga tann, at formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag ikki sjálvur hevur dirvi, at seta hart móti hørðum tá á stendur undir samráðingum, og so er tað lettari at skriva undir semju, har partur av lónarhækkingini er avskrivt av sáttmáðum okkara. Tá er lett at vera falkfelagsformaður.

Hinvegin halda vit neyvan, at tað er rættur falkfelagspolitikkur at vera so bebbaneddur fyri at lysa verkfall, at ein falkfelagsnevnd altíð skal taka til takkar við tí sum arbeiðsgevararnir bjóða, tí so vinna vit onganfio limum okkara tey sáttmálarettindi, sum tey hava uppibonio.

ALTJÓÐA TUBBAKSFRÍUR DAGUR

Fyrsta grein av fimm

Altjóða heilsufelagsskapurin, World Health Organisation, WHO tók í sínu tíð stig til alheims tubbaksfrían dag (World No Tobacco Day). WHO hevur ásett, at 31. mai á hvørjum ári skulu serlig tiltøk verða sett í verk, fyri á ein serligan hátt at gera vart við ter menniskjaligu og búskaparligu fylgjurnar av tubbaksnytslu.

Fyribyrgingarráðið vil, saman við altjóða heilsufelagsskapinum WHO eggja fólki til at halda heimini og arbeiðsplássini reykfrí í ein dag. Gongur tað fyrst vælein dag, hví so ikki fleiri dagar. Ætlaði tiltøk í áreru:

Legg-av pakkar: Meira enn 800 vórðu keyptir seinasta ár - ein góð bending um, hvussu álvarsliga nógv fólk hugsa um at leggja av.
Klipp ein seðil út, sum verður í blaðunum í vikuni frá 21. mai, og nýt hann til at keypa ein pakka fyri 25 kr. á apotekum hvíng landið.
Hetta er ein tvíhingarmikil spanring á kostnaðinum á nikotin tyggigummi, sum er viðlagt. Við í pakkanum eru eisini upplýsingar um, hvussu tað letur seg gera at leggja av at reykja við góðum úsliti.
(Apotekið og Klaksvíkar Býráð stuðla, saman við Fyribyrgingarráðinum hesum tiltaki).

Barna teknikapping: Fyribyrgingarráðið letur 3 vinningar á 500 kr. til vinnarar, sum tekna eitt upprunaligt ikki-reykja merki.
Luttakararnir verða býttir í túggjar aldursbólkar - upp til 7 ár, 7-10 ár og 10-14 ár.

Eitt reykfritt heim átak: Eitt ókeypis borðskelti verður látið við hvørjum keypi á apotekum vikuna frá 28. mai. Fólk kunnu nýta tey at gera heim teirra reykfrítt 31. mai. Reykfrí heim verja heilsuna hjá øllum, serliga okkara børnum. Hygg eftir sannroyndum um óvirðna reyking á baksiðuni á skeltinum. (Klaksvíkar Býráð stuðlar hesum tiltaki saman við Fyribyrgingarráðinum)

Fyribyrgingarráðið hevur fyriminkað eina rað av greinum í sambandi við tiltøk, sum verða Altjóða Tubbaksfría Dagin - 31. mai. Tey verða at síggja tar næstu tvær vikurnar og fevna um eitt úval av tubbaksumfeðingum.

Varaløgmaður sleingir um seg við tølum

Helgi Abrahamsen

Eg siggi, at Høgni Hoydal í blaðunum roynir at siga okkum, at føroyski búskapurin í 2000 var 96% sjálvbjargin.

Roknistykkið sær nakað soleiðis út:

Blokkstuðul	*975 mió. kr. útrent*
Avlop landskassans (ókeypis avlop)	*602 mió. kr. útrent*
Mismun	*373 mió. kr. útrent*

Út frá hesum kemur Høgni til ta niðurstøðu, at í fjør komu "bert" 373 mió. krónur av danska blokkstuðlinum inn í føroyska búskaparrenslið, og svarar hetta til 4% av samlaðu bruttotjóðarúrtøkuni.

Hetta er eitt fullkomuliga látturligt roknistykki, sum tað ikki sjónir seg einum varaløgmanni at koma við.

Men landsstýrið er eftir øllum at dømna desperat eftir at "prógva" fyri Føroya fólki, at fullveldi ber til.

Eru minni sjálvbjargin nú enn í 1999

Um vit seta eitt sama salgs roknistykki upp fyri 1999, sum Høgni ger fyri 2000, so sær tað soleiðis út:

Blokkstuðul	*945 mió. kr. útrent*
Avlop landskassans (ókeypis avlop)	*648 mió. kr. útrent*
Mismun	*297 mió. kr. útrent*

Út frá hesum sæst, at landskassin var 76 mió. krónur meira bundin av blokkinum í 2000, enn hann var í 1999.

Somuleiðis vísa roknistykkini at varaløgmaður sigur beinleiðis ósatt, tá hann skrivar: "Seinastu tvey árini er støðugt meira av blokkstuðlinum lagdur til viks og hildin uttanfyri føroyska búskaparrenslið". Veruleikin er, at avlopið hjá landskassanum minkar, meðan blokkurin veksur.

Brúkar tal sum best ber til

Stutt eftir seinasta løgtingsval skrivaði Høgni Hoydal á Føroyar vóru um at vera búskaparliga sjálvbjargnar, tí "í løtuni er yvirskotið á gjaldsjarnaðum umleið tað samasum blokkurin".

Seinni (tá gjaldsjarnaavlopið ikki longur sá so gott út), byrjaði Høgni Hoydal at samanberja blokkin við landskassaavlopið. Men tá hetta heldur ikki strekti til vórðu kommunukassarnir taldir við, og avdúgini vórðu eisini tekt frá.

Nú er eisini avlopið hjá landskassanum byrjað at minka, og tí roynir varaløgmaður, sum nakað nýtt, at rokna munin millum blokkstuðulin og landskassaavlopið sum prosentpart av bruttotjóðarúrtøkuni. - Spennandi verður at vita hvat hann finnur uppá, tá heldur ikki hetta talið nýkkur til longur.

Løgreglan við vápnum og hundum gongur ørindi fyri arbeiðsgevararnar

Sum fráboðað í Útvarpinum, so hevur løgreglan nú lagt upp í tiltøk okkara.

Henda framferð, har løgreglan møtti við vápnum og hundum, umframt at teir høvdu sjúkrabilar til reiðar, minnir ikki sørt um støðuna í diktaturstatum, men tað er tíverri einki eindømi, at løgreglan letur seg misbrúka av makthavarunum.

Vit skulu við hesum boða frá, at vit ikki ætla at bakka fyri hesum ágangi frá løgregluni, og vit hava tí ætlanir um at herða tiltøk okkara.

Vit heita á teir uml. 8000 limir okkara, sum eru í verkfalli, um at standa saman móti hesari ráðagerð, tí bert við samanhaldi kunnu vit vinna stríð okkara.

Vit vilja ikki góðtaka, at Føroya Arbeiðsgevarafelag saman við Havnar Arbeiðsmannafelag skal diktera, at limir okkara skulu hava uml. 2,5% minni lønarhækking enn hini felógini, og vit vænta at limir okkara fult út stuðla tiltøkum okkara.

Tórshavn, 17.05.2001

Føroya Arbeiðarafelag **Havnar Arbeiðskvinnufelag**